# Nýggur mønu-stingari ger grindadráp nógv skjótari



**GRINDADRÁP** Gongst sum ætlað, verður bara loyvt at brúka góðkendar mønustingarar í grindadrápi og knívurin skal hereftir bara brúkast at fáa hvalin at bløða

## 50 fólk

Formaðurin í Grindamannafelagnum, Ólavur Sjúrðarberg, heldur ikki, at tað verður nakar trupulleiki, skuldi eitt lið av umhvørvis-stríðsfólkum komið higar í summar at mótmæla grindadrápi.

Sagt hevur verið, at eini 2000 umhvørvisfólk fara at koma higar í summar, men tað heldur Ólavur Sjúrðarberg, er heilt ósannlíkt.

- Eg dugi slett ikki at síggja hvussu vit skulu kunna hýsa so nógvum fólkum, sigur hann.

- Men skuldi tað heilt ósannlíka hent, at tað koma so nógv fólk, haldi eg ikki, at vit skulu drepa grind ímeðan tey eru her.

Hinvegin heldur formaðurin í Grindamannafelagnum, at skuldi tað komið eini 20, 50, ella kanska 100 fólk higar, er tað ongin trupulleiki.

- Vit hava havt bólkar av umhvørvisfólki her áður og tað hevur ikki verið nakar trupulleiki.

- Fyri tað kunnu vit drepa tær grindir, sum koma!

- Tað er heldur ongin trupulleiki at halda grind til í Havn, hóast eitt ferðamannaskip liggur á Molanum.

- Vit skulu bara leggja okkum í geyma, at halda vit grind til, skulu vit gera okkara arbeiði til lýtar og vit skulu heldur ikki undir nøkrum umstøðum lata okkum provokera til at leypa framav, sigur Ólavur Sjúrðarberg.

**» Vit skulu gera okkara arbeiði í grind so gott og lýtaleyst sum gjørligt**

Áki Bertholdsen

Gongst sum ætlað verður tað skjótt ein farin tíð, at hvør maður fer í grindadráp við sínum egna reiðskapi.

Í hvussu so er partvís!

Arbeitt verður nú við at broyta grindareglugerðina og gongst sum ætlað, skulu broytingarnar koma í gildi næsta ár.

Ein broyting, sum ætlanin er at fáa, er, at hereftir skal tað vera mønustingarin, sum skal brúkast at avlíva hval við.

Men tað vera ein mønustingari, sum lykur heilt ítøkiligar fortreytir.

- Ætlanin er, at tað bara skulu vera góðkendir mønustingarar, sum tað verður loyvt at brúka, sigur Ólavur Sjúrðaberg, formaður í Grindamannafelagnum.

Hann sigur, at tískil er ætlanin at fáa tað sett í nyggju grindareglugerðina, at í grindadrápi skal tað bara vera loyvt at brúka mønustingarar, sum eru gjørdir eftir ávísum forskriftum.

Fyri at tryggja, at ein mønustingari lýkur krøvini, er ætlanin, at teir skulu verða góðkendir í landsstýrinum og fáa eitt stempul, so tað sæst á teimum, at teir eru góðkendir.

- Men tað er eisini ætlanin, at hereftir skal tað ikki vera hvør einstaku grindamaður sær, sum orgnar sær ein mønustingara, sigur Ólavur Sjúrðaberg.

- Vit ætlað, at hereftir skulu tað verða hvalvágirnar



*Jústines Olsen, djóralækni, royndi nýggja mønustingaran í grindini í Vestmanna í gjárkvøldið og hann letur væl at honum. Tað er Jóannes Niclasen í Miðvági, sum hevur staðið fyri at menna hendan nýggja mønustingaran*

sjálvar, ella sýslumenninir, sum hava eitt ávíst tal av mønustingarum.

- Tá ið grind er, verða teir lætnir ávísum, góðkendum grindamonnum, sum eisini hava fingið ein ávísa undirvísing í at brúka mønustingaran.

Formaðurin í Grindamannafelagnum leggur tó dent á, at tað framvegis verður brúk fyri góða gamla grindaknívinum.

- Mønustingarin er bara ætlaður at fáa lívið av hvalinum og tað verður framvegis brúk fyri knívinum at skera æðrarnar í hálsinum av, so at blóðið rennur av hvalinum fyri at tvøstið skal verða so gott sum gjørligt.

### Bara góðkendir mønustingarar

Sum støðan er nú, er tað ólógligt at brúka mønustingara. Higartil hevur hann bara verið á royndarstøði, men nú verður mett, at hann er mentir so nógv, at hann eigur at verða góðkendur grindareiðskapur.

- Vit mæla til at í nýggju grindareglugerðini, verður tað mønustingarin, sum verður góðkendur at avlíva hval við, sigur Ólavur Sjúrðarberg.

Ein grund til, at mælt verður til, at mønustingarin skal hava almenna góðkenning, er, at skal hann virka eftir ætlan, er tað neyðugt, at hann lýkur ávísar treytir.

Á grindamannafundi á Oyrarbakka týskvøldið, vísti Jústines Olsen, djóralækni,